# Tíggju ár við ferðavinnu

**Tíggju ár eru liðin, síðan felagið Ferðavinnan í Vágum varð stovnað. Menningin hevur verið heilt stór síðan tá, sigur formaðurin í felagnum, sum í dag rekur Kunningarstovuna í Vágum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Nels Olgar Joensen er formaður í Felagnum Vágar, sum rekur Kunningarstovuna í Miðvági. Tað eru 10 ár síðan Ferðavinnan í Vágum varð stovnað, men ikki fyrr enn í ár er hevur vinnan fingið so mikið av peningi, at til ber at hava Kunningarstovuna opna fulla tíð*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Ferðavinnan í Vágum hevur 10 ár á baki sum skipað felag. Broytingarnar eru so stórar, at tað ber ikki til at samanbera viðurskiftini tá og nú yvirhøvur, sigur Niels Olgar Joensen, formaður í Felagnum Vágar, sum í dag rekur Kunningarstovuna í Vágum.

Einaferð fyrst í nítiárunum vendi Ferðaráðið sær til táverandi kunningardiskin á flogvøllinum, við eini áheitan um at seta á stovn eina kunningarstovu í Vágum og fáa ferðavinnuna í oynni meira skipaða.

Kalle Soll var tá leiðari á kunningarstovuni, og hann legðist ikki á boðini. Saman við Egini Simonsen, Finnboga Niclasen og Niels Olgari Joensen varð farið undir fyrireikingarnar til at skipa ferðavinnuna í Vágum.

Tann 11. oktober 1993 varð so felagið við navninum Ferðavinnan í Vágum skipað, greiðir Niels Olgar Joensen frá. Tá høvdu tey fyrireikað felagið í umleið eitt ár, sigur hann.

Umstøðunar vóru ikki nakað soleiðis at skriva um, minnist Niels Olgar Joensen. Eingin fyrisiting var. Tað var ikki hugsandi um. Nevndin, sum sat, mátti taka sær av tí, sum gerast skuldi. Og tað vóru tey mest óhugsandi støðini, ein kundi vera staddur, tá ringt varð til kunningarstovuna. Eitt nú veit hann seg hava staðið niðri í einum súrhoyggjabrunni og tikið í móti boðum í samband við ferðavinnu, greiðir hann frá.

Seinni varð so eitt fólk sett nakrar tímar um vikuna at taka sær av uppgávunum hjá feðravinnuni. Men peningur var ikki til nakað fulltíðarstarv, sum avgjørt er neyðugt, um nakað munagott skal fáast burturúr.

Í dag eru treytirnar heilt aðrar, vísir hann á. Nú er Kunningarstova í Miðvági og kunningardiskur á flogvøllinum við hálvumtriðja starvi. Opið er allan dagin, og umstøðurnar annars eru góðar.

– Annað lagið var, tá vit byrjaðu. Fyrsti faldarin, vit lótu frá okkum, var ein kopieraður A4 faldari, minnist Niels Olgar Joensen. Í dag liggja litfaldarar við blonkum pappíri í rúgvuvís á Kunningarstovuni.

Og nevndin kann nú bara seta út í kortið og so lata starvsfólkini um restina. Jú, ásannar Nirls Olgar Joensen, broytingin tykist fullkomin.

Tó kundi hann hugsað sær, at vágafólk brúktu Kunninarstovuna í fullan mun.

Eitt nú við at siga Kunningarstovuni frá tiltøkum, sum verða í oynni, soleiðis, at hon kann boða frá hesum í lýsingum og hvussu tað nú kann falla. Eisini er skilagott at samskipa tey tiltøk, sum eru í oynni á einum stað, soleiðis, at tey ikki falla saman og á tann hátt vera til ampa hvørt fyir annað. Eisini tiltøkum aðrastaðni kann Kunningarstovan hjálpa Vágafólki við. Eitt nú at fáa atgongumerki til eitthvørt tiltak, sum hildið verður aðrastaðni í landinum landinum, sigur Niels Olgar Joensen.

Niels Olgar Joensen er í dag formaður í Felagnum Vágar, sum er ein samanlegging av Ferðavinnuni í Vágum og Vága Vinnufelag. Tað er Felagið Vágar, sum rekur Kunnignarstovuna í dag.

# Spennandi tiltak á flogvøllinum

**Kunningarstovan í Vágum fer seinni í hesum mánaðinum at skipa fyri stórum móta- og undirhaldstiltaki í bíðihøllini á flogvøllinum**

UNDIRHALD
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:**
Stórt undirhaldstiltak við mati, mótsýningum, sjónleiki og spurnarkapping verður í bíðihøllini á flogvøllinum mikukvøldið 29. oktober.

Tað er Kunningarstovan í Vágum, sum skipar fyri tiltakinum, sigur Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum.

Tiltakið fer at byrja klokkan 18.30 hetta kvøldið, og ætlanin er at halda fram til einaferð umleið klokkan ellivu, greiðir hann frá.

Ætlandi verða einir tíggju handlar í Vágum við á sjálvari mótasýningini, sum verður í tveimum hetta kvøldið.

Byrjað verður við, at cafeteria á flogvøllinum ger eitt stórt sjálvtøkuborð, sum gestirnir fara at fáa sær av. Hesin parturin av tiltakinum fer væntandi at taka ein tíma ella so, halda fyrireikararnir.

Síðan verður fyrri partur av mótasýningini, og í steðginum millum sýningarnar, verður sjónleikaframførsla og spurnarkapping. At enda verður so seinni patur av mótasýningini, sigur Terji Nielsen.

Atgongumerkini verða eisini lutaseðlar, og vinningarnir verða drignir undir tiltakinum hetta kvøldið, sigur hann.

Til at halda skil á øllum og til undirhald annars, hevur Kunningarstovan fingið Hilmar Jan Hansen vestur á flogvøllin.



*Kunningarstovan í Vágum ætlar at fylla bíðihøllina á flogvøllinum tiltiltakið, sum verður tann 29. oktober*

## Almennur fundur um flogvøll

**Vága Sambandsfelag skipar mikukvøldið fyir almennum fundi um útbygging av flogvøllinum. Fundurin verður í Miðvági**

Mikukvøldið klokkan 19.30 skipar Sambandsflokkurin í Vágum fyri almennum fundi um flogvallarútbygging í bygdarskúlanum í Miðvági.

Fundurin verður skipaður sum pallborðsfundur, har formenninir í teimum fýra stóru flokkunum á tingi fara at luttaka, sigur Marjus Dam, tingmaður Sambandsfloksins í Vágum. Eisini er ætlanin at fáa Finnboga Niclasen, flogvallarstjóra, at luttaka, sigur hann.

Ætlkanin við fundinum er at fáa ferð á aftur kjakið um flogvøllin og fáa fólk at siga sína hugsan um málið, sum mett verður at vera sovnað burtur í seinastuni, sigur Marjus Dam.



# FCK Cheerleaders til Føroya

Um vikuskiftið koma eggjarar hjá fótbóltsfelagnum FC Keypmannahavn til Føroya á vitjan. Kvinnurnar fara at dansa á Platform fríggjakvøldið og leygarkvøldið, og sunnudagin fara tær til hondbólt í Klaksvík

Uttanlands er tað vanligt, at ítróttarfeløg hava bólkar av kvinnum, sum royna at fáa lív í áskoðararnar við dansi.

Cheerleaders eru ikki bara kendar í USA, men eisini alla aðrastaðni. Eisini í Føroyum hava onkur ítróttarfeløg havt kvinnur at undirhalda.

Hetta vikuskiftið koma nakrir av teimum bestu umtóktu dansarunum av hesum slagi í Danmark til Føroya á vitjan.





*Hesar kvinnurnar skulu dansa í Havn og í Klaksvík í vikuskiftinum*

Tað er eru tær, sum ganga undir navinum FCK Cheerleaders, og tær plaga at fáa lív í áskoðararnar hjá Toda og teimum.

### Havn og Klaksvík

FCK Cheerleaders fara at dansa á Platform í Havn fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Fríggjakvøldið verður karoke-kapping millum 1. deildarspælarar hjá HB og B36, og tá fara eggjararnir úr Keypmannahavn at seta lív. Tað er James Olsen, sum fer at standa fyri kappingini, og Tummas Gudmundssen verður dj.

Leygarkvøldið fer Heðin Arge at venda plátum, og tá fara CK Cheerleaders aftur at hava framførslur.

Sunnudagin fara FCK-kvinnurnar til Klaksvíkar, har tær fara at dansa í hálvleikinum av hondbóltsdystinum millum Stjørnuna og VÍF.

# Nevnd vald at greiða arbeiðsósemjur

**Arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hava fingið hvør síni trý fólk í nevndina, sum skal orða eitt uppskot til løgtingslóg um arbeiðsósemjur**

ARBEIÐSRÆTTUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nú er nevndin sett, sum skal gera uppskot til løgtingslóg um arbeiðsósemjur.

Bjarni Djurholm landsstýrismaður við vinnumálum, hevði longu valt Kára á Rógvi, løgfrøðing til formann, og mánadagin komu restina av nøvnunum upp á pláss. Arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hava hvør síni trý umboð í nevndini.

Páll Nielsen umboðar Føroya arbeiðarafelag, Óli Jacobsen umboðar Føroya fiskimannafelag og Heini Joensen umboðar Starvsmannafelagið. Arbeiðsgevararnir hava valt Jógvan Norðbú fyri Føroyar reiðarafelag, Bjørgfrið Ludvig fyri Føroya arbeiðsgevarafelag og Thomas Magnussen fyri Fíggjarmálaráðið.

Nevndin skal gera uppskot til eina skipan, sum kann viðgera trætumál og spurningar um sáttmálabrot. Málið er ein skjótari viðgerð, og at samfelagslig áhugamál verða havd í huga. Serliga soleiðis at ósemjur og sáttmálabrot verða loyst í einari rættarskipan. Sambært arbeiðssetninginum skal skipanin hjálpa tí partinum, sum líður undir sáttmálabroti, at fáa sín rætt og uppreisn, so skjótt sum til ber.

Bólkurin skal eisini gera uppskot til broytingar í semingslógini, sum er frá 1928. Nevndin skal endurskoða og dagføra lógina í síni heild. Hon skal gera uppskotið soleiðis, at lógin fatar um bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðinum, og soleiðis at hon hóskar til nútíðar føroyska arbeiðsmarknaðin og siðvenju.

TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

**Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A)+(D) Standardlýsing ............................ kr. 650,00
(B) Stórt navn ........................................ kr. 50,00
(C) Innramming ...................................... kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**